## Umsókn, 15. mars

### Upptøkukrav:

Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9.flokk) við nóg góðum úrsliti.

### Umsókn:

Søkjast skal á umsóknarblað til miðnám, sum skal sendast á adressuna




**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

Postboks 20
Heygavegi 1A
710 Klaksvík
Faroe Islands

Tlf. int.+ 298 45 63 1
Fax. int.+ 298 45 73 11
E-mail: runih@tsk.fo


**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

**Matur og Heilsa**

# Matvøruútbúgving



**Telefon nr. 456311**
**www.tsk.fo**

# Matvøruútbúgvingin

## Nýggj útbúgving

Fyrstu næmingarnir í nýggju matvøruútbúgvingini byrjaðu í august 2010 og verða lidnir í juni 2011. Útbúgvingini á Tekniska Skúla er skipað sum eitt støðisár. Eftir lokna próvtøku hava næmingarnir førleika at koma í læru sum gastronomhjálpari
ella yrkisútbúgving innan matvøru, sum tekur sløk 4 ár.





## Gastronomhjálpari

Eftir støðisárið á Tekniska Skúla skal næmingurin finna sær eitt góðkent lærupláss og gera lærusáttmála við hetta virkið ella stovnin, um tað er hjá tí almenna. Eftir læru í ½ ár og próvtøku, hevur næmingurin lokið prógv sum gastronomhjálpari. Sostatt tekur útbúgvingin 1½ ár.



## Yrkisútbúgving innan matvøru

Tað eru fleiri yrki. Nevnast kunnu gastronomur (fyrr nevnt kokkur), tænari, smyrjubreyðjomfrú, bakari og føðsluhjálpari. Tekniski Skúli í Klaksvík hevur avtalu við Ålborg Food College um framhaldsútbúgvingar. Um næmingurin fer í læru sum gastronomur, verða 30 vikur av skúlagongdini góðkendar. Í øðrum yrkjum 20 vikur. Skúlagongdin í yrkisútbúgvingunum er millum 45 og 50 vikur. Við verkligu læruni nakað styttri enn 4 ár. Øll skúlagongdin aftaná støðisárið í Føroyum fer í fyrstu syftu fram á donskum skúla og mest sannlíkt í Ålborg. Meiri sæst á [http://www.foodcollege.dk/uddannelser/Sider/default.aspx](http://www.foodcollege.dk/uddannelser/Sider/default.aspx).

## Skúlagongdin fyrsta árið

Skúlagongdin er 40 vikur, svarandi til eitt skúlaár. Umframt ymsar verkligar lærugreinir í køkinum, eru eisini ástøðiligar og almennar lærugreinir. Tær almennu eru Føroyskt, Enskt og Støddfrøði allar á E-stigi. Miðskeiðis í skúlaárinum skulu næmingar 2 vikur út í starvsvenjing. Skúlaárið endar í juni við próvtøku.


**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

Postboks 20
Heygavegur 1A
FO-700 Klaksvík
Telefon nr. +298 456311
Telefax nr. +298 457311

E-mail: runih@tsk.fo